

*Eldradagurin byrjaði við einum hugnaligum práti afturvið rundstykkunum*

# Tey eldru hugna sær



*Árligi eldradagurin er eitt serliga gott høvi at hitta vinfólk og kenningar aftur*

**Eldradagurin í Klaksvík seinasta vikuskifti gjørdist ein sera hugnaligur dagur fyri teir meir 150 pensjónistarnir, sum tóku lut. Og fyri onkran gjørdist hetta eisini er serliga minniríkur dagur**

ELDRADAGUR
*Anna V. Ellingsgaard*
*Myndir: Bárur Lydersen*

Okkara eldru liggja ikki á tí latu síðuni. Eftir morgunmatin á árliga eldradegnum, sum hesuferð varð hildin í Ósáskúlanum í Klaksvík, stóð morgunfimleikur á skránni. Og so var bara um at koma upp úr stólinum og fylgja við fimleikalærarinnuni, Katrin Jacobsen, sum gjørdi tað bæði stuttligt og avbjóðandi at fáa blóðið at renna eitt sindur skjótari. Heilsan má sigast at hava staðið ovaliga á ynskjunum hjá teimum eldru fyri dagin, tí næst á skránni var Elisabeth Akursmørk, økonoma, sum tosaði um, hvussu umráðandi tað er við heilsugóðum matvanum eisini á eldraárunum.

## Hittust eftir 60 ár

Ymisk onnur evni vóru eisini á skránni, men fyrst og fremst snúði dagurin seg um at geva teimum eldru ein møguleika at hittast og hugna sær saman við einum góðum práti. Sum vera man, vóru tey fleiri, ið ikki høvdu hitt hvønn annan leingi, og sum gleddu seg til at taka tráðin uppaftur frá seinast, tey vóru saman.

Sum nakað heilt óvanligt hittust tvær kvinnur hendan dagin fyri fyrstu ferð, hóast tær hava skrivað saman í meir enn 60 ár. Og tað komst ikki av, at onnur búði uttanlands. Nei, báðar búgva í Føroyum, onnur í Klaksvík og onnur á Toftum, men av onkrari orsøk høvdu tær ongantíð hitt hvørja aðra. Tá so Klaksvíksdáman kendist við navnið á hinari á tekningarlistanum, hugsaði hon, at nú skuldi tað vera. Hon ringdi til Toftadámuna og spurdi, um hon mintist eitt brævi, hon hevði sent henni í einum bláum brævbjálva í 1932. Jú, Toftadáman mintist, og so varð avrátt, at Klaksvíksdáman skuldi halda brævið á lofti, tá Dúgvan kom til Klaksvíkar á eldradegnum. Uttan iva eru tær komnar at kenna hvørja aðra sera væl gjøgnum mongu brøvini, men eftir klemmunum og smílunum har á ferjuleguni í Klaksvík at døma høvdu tær báðar framvegis nógv at tosa um.

## Nýggj vinfólk

Tað var Landsfelag pensjónistanna og Pensjónistafelagið Hugnin í Klaksvík, sum skipaðu fyri eldradegnum í Klaksvík leygardagin. Dagurin er eitt árligt afturvendandi tiltak, sum Landsfelagið tekur stig til saman við lokalu eldrafeløgunum. Soleiðis ferðast dagurin til ymsar bygdir kring landi, men ein fastur táttur er stóra pensjónistaveitslan, sum verður hildin í Havn eina ferð um árið. Tá plaga eini 300 pensjónistar at koma saman til eina góða máltíð, felagssang, røður og hugnaliga samveru. Mikkjal á Bergi, formaður í Eldrafelagnum Hugnin, sigur, at tey eldru gleða seg avbera nógv bæði til veitsluna og til eldradagin, har tey flestu eftirhondini hava fingið nógv nýggj vinfólk og kenningar.

Umframt ymisk tiltøk fyri eldri, skipar Hugnin eisini javnan fyri útferðum í Føroyum. Seinast gekk leiðin til Gásadal, har bussurin hevði fingið loyvi at koyra í gjøgnum tunnilin til bygdina, har borðreitt varð við kaffi og køkum. Hesin túrurin gjørdist eitt heilt serstakt upplivilisi fyri tey eldru, sum ikki høvdu væntað, at tey nakrantíð fóru at fáa møguleikan at vitja í Gásadali, nú tey vóru komin sum mikið til aldurs.

## Virkið Landsfelag.

Mikkjal á Bergi er eisini limur í nevndini í Landsfelagnum, sum er eitt sera virkið felag. Felagið umboðar tey lokalu eldrafeløgini yvir fyri myndugleikunum í ymsum viðurskiftum, sum viðkoma teimum eldru borgarnum. Eitt nú hevur felagið júst gjørt eina avtalu við eina røð av handlum og gistingarhúsum um pensjónistaavsláttur heilt upp til 25 % á ymsar vørur og tænastur. Hetta er ein skipan, sum leingi hevur verði heilt vanlig í londunum rundanum okkum, og hendan fyrimunin eiga tey eldru í Føroyum eisini at hava, heldur Mikkjal á Bergi.



*Eini 150 pensjónistar úr Norðoyggjum og aðrastaðni úr Føroyum vóru komnir at taka lut í stóra eldradegnum í Klaksvík leygardagin*

# William Heinesen kom ikki til landið



**Landsbókasavnið mátti lúta fyri einum privatum bókasamlara í kappingini um at fáa hendur á handritinum til skaldsøguna "Den yderste tid" eftir William Heinesen, hóast bókasavnið bjóðaði tvífalt tað, sum serfrøðingarnir hjá uppboðssøluni mettu handritið vera vert**

*Rúnar Reistrup*

**Keypmannahavn:** Við 120.000 krónum og boðum um at bjóða upp á handritið til skaldsøguna *"Den yderste tid"* eftir William Heinesen, varð føroyski sendimaðurin í Keypmannahavn, Tryggvi Johansen, sendur ørindi í býin týskvøldið vegna Føroya Landsbókasavn. Leiðin gekk oman í Bredgade, har uppboðssølan Bruun-Rasmussen heldur til. Hetta kvøldið var partur av stóru bókasamlingini hjá Bjarne Saxhof á søluskránni, harímillum handrit og bøkur eftir William Heinesen.

Skaldsøgan *"Den yderste tid"* varð í síni tíð vrakað av forlagnum Levin & Munksgaard og varð heldur ikki útgivin seinni, tá William Heinesen gjørdist ein viðurkendur høvundur í Norðurlondum og helst hevði havt lætt við at fingið skaldsøguna útgivna, um hann vildi.

Áhugin fyri júst hesum handritinum var tískil sera stórur undan uppboðssøluni, og tað sást aftur á prísmetingini, sum serfrøðingarnir hjá Bruun -Ramussen høvdu sett til 40-50.000 krónur. Ein av áhugaðu keyparunum var Landsbókasavnið, sum hevði fingið pening til vega bæði frá Mentamálaráðnum og privatum sponsorum til at ogna sær handritið fyri, og sum nú bert kundi bíða eftir at hoyra hvussu leikur fór.

## Fínir harrar og bókormar

Inni í uppboðssøluhølunum í Bredgade sóust fólk stima inn stutt áðrenn klokkan fimm, tá sølan varð sett at byrja. Fínir vælklæddir italienskt- og enskttalandi harrar, stoltir antikvariatseigarar og forsagdir bókasamlarar í fótformaðum skóm sótu hvør í sínum lag og granskaðu uppboðssøluskránna eina seinastu ferð, áðrenn tann ungi auktionarius setti uppboðssøluna.

Tá uppboðssøluleiðarin kom til fjúrtandu bókina í uppboðssøluskránni, sum var handritið til *"Den yderste tid"*, vóru fleiri hendur á lofti til fyrsta boðið, sum ljóðaði á 40.000 krónur. Prísurin fór skjótt upp til 45, 50, 55 og upp til 60.000 krónur. Har steðgaði streymurin av boðum eina løtu.

Men so kom glið á aftur boðini, og upphæddin kom skjótt upp á 100.000 krónur. Nú prísurin gjørdist so høgur vóru bara tveir áhugaðir keyparar eftir. Boðið á 100.000 krónur átti Tryggvi Johansen vegna Landsbókasavnið, men her mátti føroyski sendimaðurin gevast, tí umframt sjálvan kostnaðin skulu 20 prosent latast uppboðssølufyritøkuni.

110.000 ljóðaði boðið stutt eftir, og so varð rópt fyri fyrstu, aðru og triðju ferð, áðrenn hamarin dukaði í borðið og segði frá, at William Heinesen kom ikki til Føroya í hesu syftu.

- Vit eru eitt sindur skuffaði, tí vit hildu at vit høvdu ein rímiligan kjans við teirri upphæddini, sum vit høvdu til reiðar. Tað hevði verið øgiliga áhugavert at fingið hendur á hasum handritinum, sigur Marjun Patursson, settur Landsbókavørur.

Landsbókasavnið eigur einki handrit hjá William Heinesen. Tí var tað eisini spell fyri bókasavnið, at Bruun-Rasmussen valdi at seta tvey onnur handrit hjá høvundanum, nevniliga til tey bæði útgivnu yrkingasøvnini *"Arktiske elegier"* frá 1921 og *"Høbjergning ved havet"* frá 1924, á skránna beint áðrenn handritið til *"Den yderste tid"*.

- Vit satsaðu uppá at fáa handritið til *"Den yderste tid"* so vit kundu ikki brúka av pengunum til at keypa eitt av hinum handritunum, sigur Marjun Patursson.

Hini bæði handritini hjá William Heinesen vórðu seld fyri ávikavist 35.000 og 15.000 krónur.